# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Kambsdalur móti tindunum

**Túrarnir upp á Risan og Búgvan verða høvuðsevni á kvøldsetu á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali, sum verður í annaðkvøld klokkan 19.00. Á tiltakinum, sum er alment, verður eisini borðreitt við nógvum tónleiki, næmingafrásøgn úr Budapest, lista- og fotoframsýning og frágreiðing um tað at lesa til lækna**



*Myndir og smærri filmsbrot frá áhugaverdu bjargaferðini upp á Drangan og Risan verða vístar á kvøldsetuni á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali í annaðkvøld*

KVØLDSETA

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nógv minnast helst garparnar, sum á sumri 2007 megnaðu at klúgva upp á 188 metra høga Búgvan og í 2008 enn einaferð megnaðu at sigra á einum dranga afturat, tá ið teir klintraðu upp á 75 metra høga Risan. Fyri at hesi ikki heilt vandaleysu avrik kundu eydnast, var neyðugt við miðvísari venjing og neyvari fyrireiking.

Absalon Eysturoy, sum var ein av luttakarunum á báðum ferðunum, hevur játtað at greiða frá og vísa myndir og smá filmsbrot frá áhugaverdu bjargaferðini upp á drangarnar norðanvert á Eysturoynni. Almenna tiltakið, ið Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni skipar fyri, byrjar klokkan 19.00, og bæði næmingar, foreldur, lærarar, fyrrverandi næmingar og øll onnur áhugað eru vælkomin.

Umframt frásøgnina frá ferðini uppá Búgvan og Risan, fer eitt valhold í lívfrøði at greiða frá nøkrum av tí, tey herfyri upplivdu á námsferð síni í Budapest. Tónleikaholdini á skúlanum hava lagt doyðin á venjingina í heyst, tí verður eisini nógvur tónleikur at hoyra.

Í steðginum verður somuleiðis høvi at keypa sær ein drekkamunn aftur við einum práti. Ein flokkur, sum savnar pening inn til framtíðar námsferð, fer í steðginum at selja kaffi, te og køkur.

## Fyrrverandi næmingar greiða frá

Ein fastur táttur á undanfarnum kvøldsetum á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum hevur verið vitjanir av fyrrverandi næmingum, sum skúlin hevur biðið greiða frá lívi og útbúgving teirra aftaná studentaskúlaog HF-tíðina.

Talan hevur millum annað verið um heilsuráðgevarar, juristar, ítróttarfólk, politikarar, stjórar og búskaparfrøðingar, og í ár fer skúlin at seta sjóneykuna á læknaútbúgvingina. Sagt verður ofta, at júst læknastarvið ikki bert er eitt arbeiði, men ein lívsháttur.

Høvuðsgesturin á kvøldsetuni í ár, Absalon Eysturoy, er júst vorðin liðugur sum lækni, og hann fer tí eisini at greiða gestunum frá, hvussu tað er at lesa til lækna og teirri til tíðir hørðu avbjóðing, sum tað er at fara undir hægri lestur.

Fleiri miðnámsnæmingar hugsa helst um at fara undir hægri lestur, og tí kann vera, at hendan frágreiðingin fer at geva næmingum og foreldrum teirra íblástur til møguligan framtíðar lestur.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Kristina S. Ferjá**
(Dinnafía)
Gjógv

doyði og varð jarðað.
Vit takka Jógvani Fríðrikssyni, biskupi, fyri troystarrík og vøkur orð á Mørkini og í kirkjuni.
Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, syngjarum, berarum, gravarum og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Vit takka tykkum á Mørkini fyri tíðina, Dinnafía og Jógvan Sofus búðu har.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Gjáar kirkju.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Gerda, Sjúrður, Katrin, Jónhild og Kristina**

**Dagurin**
**5. november. Malakias**, deyður í 1148. Írskur munkur, sum varð valdur til biskup í Armagh í Írlandi. Segðist at útinna mong undurverkini. Summir halda, at sipað verður til Málaki, tann síðsta av teimum 12 smáu profetunum í Gamla testamenti. Bíbilska profetanavnið merkir “mítt sendiboð”.

Sosialurin
Sosialurin
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# Sámal og Ragnar konsert í Skopunar kirkju

Hóskvøldið 6. november kl. 19.30 fara Sámal Petersen, violin og Ragnar Olsen, gittar at spæla eina konsert í Skopunar kirkju. Á skránni verða verk eftir J Jersild, J S Bach, C Sanz, L Roncalli og D Scarlatti. Konsertin verður endurtikin sum ein matiné leygardagin 8. november kl. 12 í Hoyvíkar Kirkju.

Sámal Petersen varð føddur í Klaksvík og vaks upp í Havn. Hann byrjaði at spæla violin sum 11 ára gamal. Í 1987 byrjaði hann at lesa á konservatoriinum í Odense har hann tók diplom (Master) í 1993. Meðan og aftaná lesnað spældi Sámal javnan í Odense symfoniorkestur. Hevur luttikið á masterclass hjá Valerij Klimov, Kristian Altenburger og Ernst Kovacic. Í 1994-95 var hann í Wien og fekk frálæru frá prof. Ernst Kovacic og Maigread Mc Crann. Sámal hevur síðani 1995 starvast sum lærari í musikkskúlanum í Havn. Hann er limur í Aldubáruni og konsertmeistari í Føroya symfoniorkestur. Sámal hevur spælt konsertir bæði sum kamartónleikari og solistur í Norðurlondum og Europa.



*Sámal Petersen*

Ragnar Olsen varð føddur í Havn og vaks upp í Skopun. Hann byrjaði at spæla gittar sum 13 ára gamal. Í 1998 byrjaði hann at lesa á konservatoriinum í Esbjerg har hann tók diplom (Master) í 2004 hjá Jørgen Bjørslev. Hann hevur luttikið á masterclass hjá Alvaro Pierri, John Mills og Timo Korhonen. Víðari lesnaður hjá Timo Korhonen í 2005 í Finlandi. Ragnar hevur síðani 2004 arbeitt sum lærari í musikkskúlanum í Føroyum. Ragnar hevur spælt konsert bæði sum kamartónleikari og solistur í Norðurlondum og Europa.

Illur???
Sig tína meining í Sosialinum
